# Harmonikutreff í Nólsoy

**Áhugafelagið fyri Føroyskar Harmonikuspælarar (ÁFH) hevur aðalfund um vikuskiftið úti í Nólsoy**

HARMONUKUTREFF
*tíðindaskriv*

Komandi vikuskifti verður harmonikutónleikur fyri allar pengarnar at hoyra í Nólsoy. Tá hevur ÁFH sín árliga aðalfund í bygdini, og í tí sambandi verður skipað fyri ymiskum tiltøkum í samstarvi við Stuðulsnevndina fyri Svimjihyli í Nólsoy.

Byrjað verður fríggjakvøldið, tá formligi aðalfundurin verður hildin, og síðani stendur harmonikutónleikur á skránni fyri restina av vikuskiftinum. Vanligt er, at tá ÁFH hevur aðalfund, verður spælt ymsastaðni runt staðin, har fundurin verður hildin. Reint "spontant" møta harmonikulið upp ymsastaðni at hugna um - eitt nú í handlunum í bygdini - og tað ger fólk í góðum lag.

Leygardagin verður eisini skipað fyri konsert á Kaffistovuni, har m.a. sera ungir harmonikuspælarar úr Nólsoy fara at vísa síni kynstur.

Seinni um kvøldið verður so skipað fyri almennum harmonikudansi í Royndarhúsinum, har allir luttakararnir sjálvandi sleppa framat. So er bara at leita dansiskógvarnar fram hjá teimum, ið ætla sær ein "svingom" til harmonikuna hetta vikuskiftið.



*Harmonikutónarnir fara at ljóma kring alla oynna, tá Føroyskir harmonikuspælarar hava aðalfund hetta vikuskiftið*

## Selma Mikladal í Galerie Focus

TÍÐINDASKRIV

Fríggjadagin 24. mars kl. 16 til 18 letur ein framsýning við málningum hjá Selmu Mikladal upp í Galerie Focus í Gríms Kambansgøtu 20 í Havn

Selma Mikladal er fødd í 1954 í Klaksvík, er útbúgvin sjúkrarøktarfrøðingur og hevur búð í Keypmannahavn í mong ár. Hon hevði sína fyrstu málningaframsýning í Føroyahúsinum í Keypmannahavn í 2005.

Selma Mikladal hevur altíð verið ein, sum hevur ferðast nógv, tá meina vit ikki við frá land til land, men altíð opin fyri eini diskussión, at vera her og at vera tilstaðar. Man kann merkja, at hon er áhugað og vitandi, tí samrøðan verður ikki bara førd á einum dagligum støði. Hon hevur í nógv ár verið áhuga í list, klassiskur tónleikur hevur haft stóran áhuga. Selma hevur verið nógv í Grønlandi og eisini arbeitt har og upplivað nógv spennandi. Hon hevur altíð fingist við at tekna og at mynda á ymiskan hátt. Selma er altíð á ferð í einum ella øðrum spennandi - sum nú her í Galerie Focus, her hon sýnir málningar fram. Myndevnið er ofta tað hon hevur sæð, náttúran, kenslurnar og tað sum stendur eftir, ikki eitt ávíst stað, men samanumtikið tað sansaða, tað upplivaða, tann umgjørða myndin.

Framsýningin verður opin til 6. apríl, týsdag til fríggjadag kl. 15 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.


*Selma Mikladal*

formula.fo



miðlahúsið í Vágsbotni

Hvønn dag í mars mánaða verða Sudoku uppgávur at finna í Sosialinum.

Jú fleiri uppgávur, ið tú hevur loyst, tess størri møguleika hevur tú at vinna.

Sendið okkum loysnirnar innan 3. apríl kl. 10.00 og viðmerkið brævbjálvan "Sudoku".

Vinningurin er ein Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 fartelda frá Formula.fo, virði 7.995,– kr.

Fujitsu Siemens Amilo Pro V2035 hevur m.a.:
· Intel Celeron M380 Processor · 1,6 GHz Celeron proccessor · 1 MB Cache · 512 MB DDR2 RAM PC533 · 60 GB S-ATA Harðdisk · DVD+/-RW DL Brennara · VIA N800 Grafikkkort upp til 64 MB · Ljóðkort & Stereo Hátalarar · 10/100 Mbit netkort · 4 x USB 2.0 · 15" WXGA TFT skíggja · Tráðleyst netkort GemTek 802.11 BG · 56K V.90 modem MDC1.5 · Windows XP Pro DK (MUI)

Drigið verður fyrstu vikuna í apríl.

Fyri at vera við í kappingini, skulu allar uppgávurnar verða loystar

## SUDOKU mars KAPPING

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | 5 | | | 3 | 7 | |
| 9 | | 4 | 2 | | 8 | | | |
| | 7 | 1 | | | 6 | 8 | | |
| 1 | | 6 | 3 | 9 | | 7 | | |
| 7 | | | | 4 | | | | 6 |
| | | 5 | | 6 | 1 | 4 | | 2 |
| | | 9 | 6 | | | 1 | 8 | |
| | | | 4 | | 3 | 2 | | 5 |
| | 8 | 2 | | | 9 | | | |

SERA LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 5 | | 9 | | | 8 | | | |
| | 2 | 4 | 7 | 5 | | 3 | | |
| | 7 | | | | 1 | 2 | | |
| | | | | | 9 | | 2 | |
| 8 | | | 6 | | 4 | | | 5 |
| | 1 | | 5 | | | | | |
| | | 3 | 8 | | | | 6 | |
| | | 7 | | 4 | 2 | 8 | 9 | |
| | | | 9 | | | 7 | | 3 |

LØTT

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | | | | | | | | 4 |
| | | 2 | 6 | | 9 | 1 | | |
| | 9 | | 4 | | 5 | | 8 | |
| | 3 | 8 | | | | 5 | 6 | |
| | | | | | | | | |
| | 4 | 1 | | | | 9 | 2 | |
| | 1 | | 3 | | 2 | | 5 | |
| | | 7 | 8 | | 6 | 2 | | |
| 6 | | | | | | | | 3 |

MIÐAL

| | | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | | | | | 2 | 3 | | |
| 9 | | | 7 | | 6 | | | 1 |
| | 2 | 7 | | | | | 4 | |
| 8 | 5 | | | | | | 3 | |
| | | | 8 | | 9 | | | |
| | 1 | | | | | | 2 | 6 |
| | 4 | | | | | 9 | 6 | |
| 5 | | | 6 | | 7 | | | 3 |
| | | 8 | 3 | | | | | |

TRUPUL

NAVN: ______________________ BÚSTAÐUR: ______________________

Sendið til: Sosialurin · Box 76 · 110 Tórshavn. Merkið brævbjálvan "Sudoku"

Sosialurin
Tórsgøta 1 · P.O. Boks 76 · FO-110 Tórshavn · Tel 34 18 00
Fax 34 18 01 · post@sosialurin.fo · www. sosialurin.fo